# Forsetavalið í Hoydølum

**Hósdagurin í síðstu viku varð í Studentaskúlanum nýttur til kunning um spennandi forsetavalið í USA, sum er á skránni í dag**

ALTJÓÐA POLITIKKUR Í HOYDØLUM
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*


*Frá temadegnum í Hoydølum í farnu viku*
*Mynd Jens K Vang*

Í dag fara amerikanararnir at gera av, hvør skal búgva í Hvítu húsunum næstu fýra árini. Sambært veljarakanningunum er talan um sera tætta uppgerð millum John Kerry og George W. Bush. Sitandi forsetin hevur í veljarakanningunum verið eitt vet frammanfyri avbjóðaran. Men munurin hevur verið so mikið lítil, at einki er avgjørt, nú amerikanararnir fara at atkvøða. Umframt at velja forseta gera tey í USA í dag eisini av, hvussu Kongressin skal verða mannað næstu árini. Allir 435 limirnir í Umboðsmannatinginum skulu veljast fyri tvey tey næstu árini, og ein triðingur av teimum 100 limunum í Senatinum skulu veljast fyri næstu seks árini.

Amerikanska valið og valstríðið og serliga spurningurin um, hvør skal verða forseti, hevur seinastu vikurnar ikki bara upptikið tey í USA. Kring allan heimin hevur verið fylgt væl við í valstríðnum og veljarakanningunum. Tað er ikki so undarligt, tí einki er at ivast í, at tann, sum situr í Hvítu húsunum, situr í valdmiklasta starvinum í øllum heiminum. Viðhvørt hevur tað verið tikið til, at tað ikki bara áttu at verið amerikanararnir, sum valdu forseta í USA, men fólk kring allan heimin. Tí amerikanski forsetin hevur á so mangan hátt møguleika at ávirka alla staðni.

Ymsa staðni kring heimin hava skúlar gjørt burturúr valinum í undirvísingini, eitt nú við at skipa fyri temadøgum. Soleiðis varð eisini gjørt í Hoydølum hósdagin í síðstu viku. Ein av lærarunum, Karin Jóhanna Knudsen, sum undirvísir í samfelagsfrøði og enskum, tók stig til tematímar og vitjan í Havnar Bio. Talan var um eitt tilboð, sum lærarnir saman við flokkunum høvdu møguleika at melda seg til. Áhugin var ovurhondsstórur, mest sum allur skúlin luttók. Tað er ikki rúmsátt í Hoydølum, so felagstímar vóru bæði í samkomuhøllini og fimleikarahøllini.

Á skránni vóru trý tiltøk. Jan Berg Jørgensen, sum undirvísir í skúlanum í filmsvísind, umframt at hann arbeiðir í Sjónvarpi Føroya, skipaði saman við sínum næmingum fyri framløgu, har evnið var Dokumentarfilmar sum sjangra. Eitt nú varð víst á, hvussu sjangran er tillagað og broytt, síðani hon kom fram fyri mongum árum síðani. Serligt fokus var á filminum hjá Michael Moore, Fahrenheit Nine/-Eleven, sum hevur verið so nógv umrøddur, og sum hesar seinastu vikurnar hevur verið at sæð í Havnar Bio.

At fokus serliga var á hesum filminum, ið hevur sum mál at seta George W. Bush í ringt ljós og at fáa veljararnar í USA at venda sær frá honum, komst av, at triði parturin av temadegnum var vitjan í Havnar Bio. Eftir at tiltakið í Hoydølum var liðugt, fóru næmingarnir oman í býin at hyggja at hesum filminum.

Annar tátturin á skránni var kunning um, hvussu valini, sum eru í USA í dag, ganga fyri seg. Jóannes Hansen, sum undirvísir í Studentaskúlanum á Kambsdali og í HF skeiðnum í Klaksvík, vitjaði í Hoydølum saman við næmingum, sum hann undirvísir í samfelagsfrøði. Jóannes Hansen lýsti út frá grundlógini hjá USA bakgrundina fyri amerikansku valskipanini, hvørjar leiklutir Forsetin, Kongressin og Hægsti rættur hava, hvørjar líkheitir og hvørjir munir eru á forsetavalevnunum, hvat veljarakanningar hava sagt síðstu vikuna, og hvat tað verður roknað við, at úrslitið fer at verða í statunum runt um í USA.

Sambært næmingum og lærarum, sum vóru við í Hoydølum henda dagin, var tiltakið áhugavert og væl eydnað. Ein øðrvísi skúladagur sum næmingarnir ivaleyst fara at minnast, og eitt tiltak, sum ger, at næmingarnir ivaleyst hava betri hug og fyritreytir at fylgja við í kvøld og í nátt, hvussu tað fer at tørna út í USA.




Vika 45, 2004
www.kaupthing.fo

# Forsetavalið í USA ikki størsta týdning

MARKNAÐARRÁK

Sera hendingarrík vika er fyri framman, sum kann føra við sær skiftandi marknaðir. Mikudagin vita vit, um USA fær nýggjan forseta, men hetta fer sannlíkt einans at ávirka marknaðirnar í eitt stutt tíðarbil. Fríggjadagin verður týðandi arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin úr USA kunngjørd. Kaupthing metir at frágreiðingin, sum kann gerast bjørt, gera av, hvussu fíggjarmarknaðirnir fara at hátta sær næsta mánaðin. Ein sannroynd er, at renturnar framvegis eru ov lágar.

Í 3. ársfj. vaks búskapurin í USA bert 3,7% móti teimum væntaðu 4,3%. Onnur tøl vístu m.a., at nýtsluhugurin hjá einstaklingum og íløguhugurin hjá virkjum er góður. Samanumtikið er tí góður møguleiki fyri framhaldandi vøkstri í USA. Tí fer FED aftur at hækka rentuna 10. novembur í 2,0%.

Mikudagin vístu tøl, at oljugoymslurnar í USA eru hækkaðar. Somuleiðis varð oljuverkfallið í Noreg avblást og Kina hækkaði rentuna, orsakað av hitaðum búskapi. Hetta kundi bent á, at kinverski oljutørvurin verður lækkandi. Av hesum orsøkum lækkaði oljan 5,4% í vikuni, og hetta legði trýst á oljupartabrøv. Oljumarknaðurin er enn følin, og lítið skal til fyri at ávirka prísin.

Roknskapurin hjá Danske Bank varð góður. Serliga tølini fyri tap og burturleggingar vóru góð, samstundis sum útlánini hækkaðu sløk 12%. Nordea kunngjørdi eisini ein hampuligan roknskap, men Nordea missir marknaðarpart. Báðir bankarnir eru trýstir av lága rentumarginalinum, men útlánsvøksturin hjá Danske Bank fer at stimbra, tá renturnar aftur hækka. Danske Bank er hækkað um 2,5% síðani roknskapin og Nordea 4,2%. Hesa vikuna kunngera m.a. Deutsche Bank og GN Store Nord Roknskap.

Líkt er til, at forsetavalið í USA verður javnt. Trupult er at siga, hvussu úrslitið fer at ávirka fíggjarmarknaðirnar. Næstu dagarnar kann valið ávirka nógv, men sum frálíður verður ávirkanin væntandi lítil. Ein orsøkin er, at hóast Kerry vinnur, so er líkt til at republikanararnir fáa meirilutan í lóggávutinginum. Av tí at arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin eisini kemur hesa vikuna, kann staðfestast, at ein spennandi og væntandi óstøðug vika er fyri framman.

**Rentur**

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% |
| 2 ára lánsbræv | 2,41% | 0,03% |
| 5 ára lánsbræv | 3,28% | 0,03% |
| 10 ára lánsbræv | 4,17% | 0,03% |

**Partabrævavísitøl**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 272,9 | -0,5% |
| OMX, Svøriki | 706,1 | 2,9% |
| Eurostoxx 50, Evropa | 2.822,5 | 3,2% |
| S&P 500, USA | 1.130,2 | 3,2% |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 105,57 | -0,4% |
| Evru Lánsbrøv | 169,38 | -0,1% |
| Norron Partabrøv | 82,60 | 1,0% |
| Altjóða Vøkstur | 57,76 | 1,0% |

**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 583,26 | 0,5% |
| EUR | 743,26 | 0,0% |
| GBP | 1.069,01 | 0,0% |
| NOK | 91,34 | 1,2% |

*Renta og kursir kl 10 ígjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*



# Andrias Petersen í demokratiskum valstríði

**– Valstríðið er heilt øðrvísi, enn vit kenna tað her heima. Í gøtunum í New York sæst púrt einki til valstríðið. Her er ikki ein einasta plakat, ongar lýsingar á bussunum ella nakað líknandi. Valstemningurin er nærmast óinteressantur, burtursæð frá sjónvarpinum. Seinastu vikurnar hevur Andrias Petersen, løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin, verið á ST aðalfundi í New York, har hann hevur upplivað endabrestin á amerikanska valstríðnum**




Tíðindaskriv

– Tað, sum vit í New York uppliva av valstríði er alt gjøgnum sjónvarpið. Vit síggja Bush og Kerry flúgva frá stati til stat og halda veljarafundir og lýsingar, har teir hvør í sínum lag royna at minka um trúvirðið hjá mótpartinum. Lýsingarnar snúgva seg ikki um at greiða frá, hvat kandidaturin sjálvur stendur fyri, men heldur at spilla mótpartin út, sigur Andrias Petersen úr New York.

Andrias Petersen greiðir frá, at hann hevur upplivað valstríðið soleiðis, at tað verða førd ymisk politisk evni fram í ávísa tíð. Tað verður ikki tosað so nógv um heildarpolitikk allatíðina.

– Fyrstu vikuna snúi valstríðið seg um, at tað vantaði vaccina fyri beinkrím í USA. Næsta vikan snúi tað seg um, at 380 tons av spreingievni vóru blivin burtur í Irak. Síðani kom bandið frá Osama bin Laden, um at amerikanarar ikki skulu kenna seg tryggar. Og tað hevur verið evnið síðani, sigur Andrias Petersen.

## Stríð um heilsuverk

Kortini heldur Andrias Petersen, at okkurt av evnunum kortini er ketað saman í ein heildarpolitiskan samanhang. Serliga legði hann merki til hetta, tá tosað varð um vantandi vaccinuna ímóti beinkrími. Tá fór valstríðið eisini at snúgva seg um heilsuverkið og um sjúkratryggingarnar.

– Bush sigur, at tað almenna ikki skal blanda seg uppí heilsuverkið. Hann vísir á, at allur heimurin misunnar USA heilsuverkið, sum verður stýrt av marknaðarkreftunum. Og soleiðis vil hann hava tað at verða verandi. Sama heldur hann um amerikansku sjúkratryggingina, sum er ein góð forrætning; líka góð forrætning, sum at dríva bankavirksemi.

– Men Kerry vil hava, at tað almenna eisini skal hava sín leiklut innan heilsuverkið. Og tað skilji eg væl, tí nú ein dagin, eg var og vitjaði í einum lítlum býi, sá eg eina bingo lýsing, har bingo skuldi haldast, so ein vanligur arbeiðari í býnum fekk møguleika at fáa eina by pass skurðviðgerð. So amerikanska sjúkratryggingin er ikki betur enn so. Tryggingin er dýr, og øll hava ikki ráð at gjalda, tí eru umleið 40 milliónir amerikanarar uttan sjúkratrygging. Eg dugi ikki at síggja nakran fyrimun við amerikanska heilsuverkinum, sum Bush heldur vera so gott, sigur Andrias Petersen og vísir á, at Kerry vil broyta heilsuverkið til at líkjast tí skandinaviska.



## Lívligt valstríð í smáplássunum

Seinasta vikuskiftið vóru Andrias Petersen og konan Katrin í North Carolina og vitjaðu sonin, Arna, og verdótturina, Duritu. Tey búgva í lítla býnum, Morehead City, sum er eitt sindur størri enn Klaksvík. Har upplivdu tey valstríðið meira beinleiðis, enn tey gjørdu í New York.

– Her vóru plakatir í rúgvuvís allastaðni. Sjálvt í havunum og á húsaveggjunum hjá privatfólki vóru nógvar plakatir at síggja. Her settu fólk plakatir av teimum, sum tey ætlaðu sær at velja, út í havan hjá sær sjálvum. Tað var nokk so stuttligt at síggja. Í einari gøtu taldi eg plakatirnar. Tær flestu átti Republikanararnir og Bush, tíverri, sigur Andrias Petersen, men leggur afturat, at hetta var eitt villaøki.

– Vit vóru eisini á einum republikanskum veljarafundi á Atlantic Beach, sum er ein oyggj uttan fyri býin, har sonurin býr. Tað vóru vietnamveteranar fyri Bush, ið skipaðu fyri fundinum, sum varð hildin á einum parkeringsplássi uttan fyri eina handilsmiðstøð. Tað vóru umleið 100 fólk á fundinum, har valevni og umboð fyri nøkur valevni stóðu í farmabilum og hildu røður. Hetta tóktist rættiliga føroyskt.

Andrias Petersen greiðir frá, at amerikanska valið ikki bert snýr seg um at velja forseta, men um at velja senatorar, ella tingmenn, og enntá dómarar.

– Á valfundinum legði eg merki til ein, sum umboðaði eina konu, sum var uppstillað til dómaravalið. Hesin gjørdi vart við, at hon hevði røttu virðini at verða vald, tí hon var gift, hevði børn og var ein góður konservativur amerikanari. Hetta vóru tey sokallaðu góðu virðini hjá hesum republikanska valevninum, sigur Andrias speiskliga.

## Vitjaðu valevni

Andrias og Katrin fingu eisini møguleika at heilsa uppá eitt av valevnunum, meðan tey vóru í Morehead City. Tey hittu Malcolm Fulcher, sum hevur sitið í 20 ár í the North Carolina Senate og nú stillar uppaftur til N.C. Senate fyri Demokratarnar í Carteret County. Fulcher er útbúgvin studentaskúlalærari, og hevur tí stóran áhuga fyri útbúgvingarmálum. Eitt av hansara aðalmálum er at fáa samskipað tey ymisku universitetini í valdøminum.

– Vit vóru og vitjaðu hann í hølunum hjá demokratunum, og eg fekk eisini eitt sindur av valtilfari frá honum. Hann greiddi mær frá, at hann brúkti umleið 3 túsund dollarar til valið. So tað má sigast at vera stórur munur á, tá hugsað verður um, at onnur brúka milliardir. Men Fulcher segði seg hava nógv fólk at arbeiða fyri seg. Hann var uppstillaður í tveimum amtum, og roknaði við at hava góðan møguleika at verða valdur. Ikki uppá pengarnar, men tí at hann hevur nógv fólk at arbeiða fyri seg. Hetta minti meg nógv á føroyska valstríðið, greiðir Andrias Petersen frá.

## Norðurlond halda við Kerry

Andrias Petersen er komin í samband við nógv fólk á ST aðalfundinum í New York. Men kortini verður ikki tosað nógv um valið á sjálvum ST fundinum. Men tá tey hava verið til døgurða á ymiskum ambasadum, er tosið oftani fallið inn á valið.

– Sjálvandi vilja ambassadørarnir ikki siga, hvat úrslit teir vóna. Men eg havi tosað við nógv útsend fólk, frá skandinavia og har er tad greitt, at tey ynskja, at Kerry vinnur valið. Og tað geri eg eisini, sigur Andrias Petersen. Tad snýr seg um tveir konservativar kandidatar, harav annar, Buch er ultra konservativur og Kerry er meira moderat konservativur. Seinastu veljarakanningarnar nú kl. 10 sunnukvøld siga at tad stendur á jøvnum ímillum kandidatarnar.

# Kvinnufundur í Suðuroynni

**Kring landið hava fundir verið undir heitinum Felags ábyrgd, felags avgerðir. Kvinnubólkurin í Suðuroy skipar týsdagin fyri fundi undir sama heitinum**

KVINNUFUNDUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Týsdagin 2. november klokkan 19 verður fundur í skúlanum í Hovi. Heitið er Felags ábyrgd, felags avgerðir, og hava hesir fundir verið hildnir kring landið. Tað er Kvinnubólkururin í Suðuroynni, ið skipar fyri, og samskipari er Marjun Olsen.

Fyrilestrarhaldarar vera Marjun Olsen (samskipari), Annika Wardum Joensen, Forkvinna í javnstøðunevndini, Karolina Enni og Àsgerð Stenberg, og møguliga onkur royndur kvinnuligur politikari.

Endamáli er at seta fokus á skeiva kynsbýtið í bý- og bygdaráðum og at eggja og stuðla kvinnum, sum stilla upp. Eisini hava hesir fundir til endamáls at gera kvinnur, sum ikki stilla upp, tilvitaðar um týdningin av at velja kvinnur.

Allar kvinnur í Suðuroy eru vælkomnar, sigur Marjun Olsen, samskipari, í tíðindaskrivi frá kvinnubólkinum.

# Sancy fekk minu í trolið

**Trolarin Sancy fekk minu í trolið, tá teir royndu á Íslandsrygginum, visti heimasíðan hjá Suðurrás at siga hósdagin. Minan varð sprongd í grótbrotinumí Porkeri hóskvøldið**

MINA

Trolarin Sancy úr Vági lá hósdagin við bryggju í Vági og bíðaði eftir spreingiserfrøðingum frá Marinustøðini. Minnan var illa farin og lá á bátadekkinum, visit heimasíðan hjá Suðurrás - www.sudurras.fo – at siga hósdagin.

Sancy fekk minuna í trolið, tá teir royndu á Íslandsrygginum.

Minan varð sprongd í grótbrotinum í Porkeri hóskvøldið.